HEILSUFRØÐILIGA
STARVSSTOVAN
FOOD AND ENVIRONMENTAL AGENCY

Tórshavn, tann 3. oktober 1995
Mál nr.: 616-95-0015-1

IRF
520 Leirvík

Í skrivi dagfest 19. juni 1995, søkir Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin (IRF) um umhvørvisgóðkenning, sambært grein 26 í umhvørvisverndarlógini um serliga dálkandi virkir, til at gera eitt móttøkupláss inni á tyrvingarplássinum í Sandarhaga í Sandoy til goymslu av septiktangaevju/rottangaevju.

**Skjøl sum eru nýtt í góðkenningini:**

- Umsókn frá IRF dagfest 19. juni 1995
- Tekning frá Sámal Johannesen, verkfrøðingi: Ætlan yvir plássið dagfest 12. juni 1995.
- Uppskot til skipan fyri tøming v.m. av rottangum og reinsiverkum hjá IRF (Januar 1995).

Um evjuplássið:

Nýggja evjuplássið til spillvatnsevju/rottangaevju er innrættað á tyrvingarplássinum í Sandarhaga í Sandoy beint eystan fyri verandi tyrvingarøki. Ætlanin er at goyma umleið 3,6 $m^3$ um vikuna tað fyrsta árið og 1,8 $m^3$ um vikuna tað næsta árið. Økið er 200 $m^2$ til støddar, býtt yvir 2 brunnar á 100 $m^2$.

Brunnveggirnir verða stoyptir upp, og net spent uppi yvir øllum móttøkuøkinum fyri at halda fugl burtur.

Upplýsingar um dálking og dálkingaravmarkandi atgerðir:

Á botninum á basenginum verður eitt drenlag gjørt av gróti. Drenvatnið verður leitt burtur frá økinum ígjøgnum rørleiðing í ein botnfellingarbrunn, ið er felags fyri bæði økini, og í rørleiðing beint út á sjógv. Stoypt verður rundan um brunnarnar fyri at leiða regnvatn uttan um lagunina.

Treytir fyri góðkenningini:

Grundað á fyriliggjandi upplýsingar, innrætting og rakstur av evjuøkinum eystan fyri tyrvingarplássið úti í Sandarhaga í Sandoy, gevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan, sambært grein 26 í lóg nr. 134 frá 29. okt. 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 196 frá 5. november 1993 um spillvatnsevju Interkommunala Renovatiónsfelagsskapinum (IRF) góðkenning til at gera og reka eitt móttøkupláss fyri spillvatnsevju undir fylgjandi treytum.

Debesartrøð, FR-100 Tórshavn, Faroe Islands, Tlf. Int. + 298 15300, Fax Int. + 298 10508

Innrætting:

1. Økið, sum nýtt verður til goymslu av spillvatnsevju/rottangaevju, innan fyri longarða tyrvingarplássið í Sandarhaga í Sandoy sambært ávístu tekning dagfest 12. juni 1995.
2. Hegn skal setast upp rundan um lagunurnar.
3. Botnurin á lagununum skal verða innrættaður við einum vælvirkandi drenlagi.
4. Neyðugur vaskiútbúnaður skal vera á økinum
5. Øll frárenning frá vaski-, móttøku - og goymsluplássinum skal leiðast í rør og í ein felags botnfellingarbrunn áðrenn útleiðing á sjógv.
6. Møguleiki skal verða fyri sýnistøku av frárenslvatni úr botnfellingarbrunninum.
7. Brunnveggir skulu steypast rundanum lagunurnar, sum tryggja at yvirflatuvatn frá økinum uttanum, skal leiðast uttan um lagunurnar.
8. Net ella tættmeskað hegn, sum er so tætt, at fuglur ikki sleppur at evjuni, skal spennast yvir økið.
9. Neyðugur vaskiútbúnaður skal vera á økinum

Rakstur:

10. Evja frá vegristum, oljuútskiljarum o.t. skal ikki viðgerast á plássinum, men leggjast beinleiðis á tyrvingarplássið
11. Rusl o.a. skal mekaniskt skiljast frá evjuni og beinast á brennistøðina.
12. Lagið av evju í lagununi skal í mesta lagi vera 1,5 m tjúkt, og skal altíð vera minst 1 metur frá yvirrondini á netinum.
13. Evjan skal sóttreinsast við kálki soleiðis at pH er omanfyri 11. (t.v.s. umleið 300 g pr. kg. turrevju) tá hon verður løgd á plássið.
14. Botnfellingarbrunnurin skal eftirhyggjast javnan og tømast so ofta neyðugt er.

Eftirlit:

15. IRF skal á hvørjum ári gera mikrobiologiskar og kemiskar kanningar av evjuni. Kanningarætlan skal gerast í samráð við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna
16. Kanningar av frárenslinum skulu gerast umleið tvær ferð árliga í sambandi við eftirlitið annars á tyrvingarplássinum.
17. Rakstrarbók skal førast yvir móttiknar nøgdir, og skal Heilsufrøðiliga Starvsstovan í januar mánað á hvørjum ári hava fráboðan um móttiknar nøgdir frá undanfarna ári.
18. Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur eftirlit við evjuøkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

Góðkenning:

Tá oyggjaplássið er klárt at taka í nýtslu, og áðrenn raksturin á økinum byrjar, skal Heilsufrøðiliga Starvsstovan fráboðast.

Skal avvatnaða lagraða oyggjan nýtast, t.d. at fyrva við, skal søkjast um serskilda góðkenning.

IRF hevur ábyrgd av, at oyggjaplássið verður rikið sambært treytunum í hesi góðkenning.

Sambært § 26 í umhvørvisverndarlógini má virkið ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið hevur ávirkan á dálkingarviðurskiftini hjá virkinum, fyrr enn víðkanin ella broytingin er góðkend.

Kæra:

Avgerðir tiknar av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni kunnu sambært § 66 í umhvørvisverndarlógini kærast til Føroya Landsstýri. Kærufreistin er 4 vikur, frá tí degi avgerðin er almannakunngjørd. Kæran skal sendast Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sum síðan sendir kæruna til Føroya Landsstýri.

Tórshavn, tann 3. oktober 1995

Vinarliga

Marjun Hanusardóttir
Stjóri

Jacob Pauli Joensen
Deildarleiðari

Avrit:
Sands Kommuna